**OPEL ASTRA 1600 TIL SØLU**



Árg. 97 - Km 85.000
Bilurin er ógvuliga snotuligur
og sera økonomiskur í brúki.
Til sølu vegna flyting

Prísuppskot kr. 65.000,-

Áhugaði vinarliga ringi á tel. 252825

Sosialurin 341800

**Til Sølu**
PEUGEOT T 307



grønur
árg. 2002
km.39.000

**PRÍSUR KR. 120.000,-**
**Tel 27 29 88**

Sosialurin

Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo

**Norðurlandahúsið í Føroyum**

Sí SVF tekstvarp s. 650

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3833
Navn: Sp/f HEIMARU
Adressa: 513 Syðrugøta

Kommuna: Gøtu Kommuna
Stovningardato: 26.07.2004
Viðtøkudato: 26.07.2004
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Jóna Mourentsa Mohr í Grund, 513 Syðrugøta.
Stjórn: Jóna Mourentsa Mohr í Grund, 513 Syðrugøta.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirksrift av einum stjóra.
Grannskoðari: Sp/f Agnar á Dul, Gerðagøta 31, 700 Klaskvík.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 01.08.2004 - 31.12.2005
Endamál: Endamál felagsins er at reka heil- og smásølu, sólviðgerð, útleigan og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 3. august 2004

Kristin Balle

# Andaligi mentanar-arvur føroyinga



*Sanna Hammer er leiðari av felagskapinum, Youth With A Mission í Føroyum. Á ólavsøku setti hon eina framsýning upp, har roynt varð at lýsa andaliga mentanararv føroyinga*

**Á ólavsøku var framsýning á Margarinfabrikkini um, hvønn týdning Gud hevur í okkara mentan í dag. Tað var Sanna Hammer, leiðari av felagsskapinum, Youth With A Mission í Føroyum, sum setti framsýningina upp**

GUDSTRÚGV OG MENTAN
*Orð og myndir:*
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

– Tað verður sagt, at Føroyar vórðu kristnaðar við "svørð og slag", men hetta hóskar als ikki saman við Guds eyðkennum. Gud er ikki ein sum hóttir menniskju - Gud er ein, sum býður menniskjum at koma til sín, og biður okkum kasta allar okkar byrðar á seg, sigur Sanna Hammer, sum á ólavsøku hevði eina framsýning á Margarinfabrikkini, sum skuldi lýsa, hvønn týdning Gud hevur í okkara mentan í dag.

So hvørt, sum fornfrøðingar koma fram á leivdir ymsastaðni í Føroyum, sæst, at munkar hava búleikast her. Seinasta ábending um hetta er, tá keltiskir krossar vórðu funnir í Leirvík fyrr í ár.





*Tey, ið vitjaðu framsýningina, fingu eisini høvi at svara spurninginum um, hvat pláss tey mettu, at Gud hevur í okkara mentan í dag, og hvat árin tey rokna við, at tað kemur at hava fyri framtíð Føroya*

– Fyri mær er tað eingin ivi um, at tað er við munkunum, at trúgvin á Gud hevur rótfest seg í føroyinginum og ikki við einum hóttandi Sigmundi Brestisyni, sum søgnin vil vera við, sigur Sanna.

Gudstrúgvin er ein stórur partur av okkara mentan. Í nógv størri mun, enn vit vanliga geva okkum far um, sæst aftur, at í Føroyum býr eitt fólk, ið trýr á ein altvaldandi Gud.

Sanna Hammer er leiðari av felagskapinum, Youth With A Mission í Føroyum, og á eini framsýning á Margarinfabrikkini á ólavsøku royndi hon at lýsa andaliga mentanararv føroyinga.

– Eg havi verið virkin innan altjóða trúboðan í mong ár og ferðast til nógv lond, fyri tað mesta tilafturskomin lond - og lond, har tey als ikki kenna Gud. Tað leiddi meg at hugsa um, hvussu nógv okkara gerandisdagur í Føroyum er merktur av, at vit trúgva á Gud, um hvussu stórliga okkara land er signað og um, hvussu gott vit hava tað í Føroyum, greiðir Sanna frá.

– Vit kunnu siga, at vit hava fýra súlur, sum stuðla undir okkara samfelag. Fyrst og fremst familjuna, sum er grundarsteinurin í samfelagnum. Hetta hava eisini allir politiskir flokkar við í sínum stevnum. Síðani er tað flaggið, sum er ímynd av Kristi krossi, og tjóðsangur okkara er eisini ein tilbiðjan til Gud.

– Eisini okkara siðalæra er sera nógv merkt av gudstrúgv, eitt nú verða børn okkara lærd at biðja frá barni av og verða signaði, tá tey fara frá húsum.

– "Guds friður í húsi", "Jesus fylgi tær" og "Um Gud vil" eru hugtøk í málinum, sum eina mest siga frá aldargomlu gudstrúgv føroyinga.

Tey, ið vitjaðu framsýningina, fingu eisini høvi at svara spurninginum um, hvat pláss tey mettu, at Gud hevur í okkara mentan í dag, og hvat árin tey rokna við, at tað kemur at hava fyri framtíðina.

Framsýningin staðfesti, at Gud hevur nógv størri pláss í okkara mentan og samfelagsskipan, enn vit vanliga geva okkum far um.

Sum svar uppá, hvat árin tað kemur at hava fyri framtíð Føroya, svaraði ein av teimum vitjandi:

"Týdngurin av tí má ikki undirmetast, tí Gud fer at brúka tað á sínum tíma".



# Handilslívið í Klaksvík við at doyggja

**Seinastu tveir mánaðirnar hava 7 handlar í Klaksvík latið aftur. - Taka handilsfólkini seg ikki saman alt fyri eitt, fær tað sera álvarsamar avleiðingar fyri býin, sigur Henrik Thøgersen, formaður í handilsfelagnum í Klaksvík**

HANDILSLÍV
*Anna V. Ellingsgaard,*
*anna@sosialurin.fo*

Sum blaðið vísti á í gjár, er okkurt, sum ikki ruggar rætt við handilslívinum í Klaksvík. Sambært Norðlýsinum ávarar handilsmaðurin Eivind Jacobsen av Strondum um, at um ikki okkurt munagott skjótt hendir, so skulu klaksvíkingar ikki vænta at síggja nógv avbygdafólk koma til Klaksvíkar til handils, tá tunnilin letur upp.



- Eg eri púra samdur við tí, sum Eivind hevur sagt, sigur formaðurin í Klaksvíkar handilsfelag, Henrik Thøgersen, sum eisini er dagligur leiðari í Bónus í Klaksvík. Henrik sigur seg nú av álvara vera bangnan fyri, at um handilsfólk í Klaksvík ikki taka seg saman alt fyri eitt, fer tað at fáa alvarsamar avleiðingar fyri handilslívið í býnum, og harvið fyri býin sum heild.

## Fata ikki álvaran

Skelti við "afturlatingarútsøla" ella pappír fyri vindeyguni er vorðið ein vanlig sjón eftirhondini, tá tú gongur framvið handilsvindeygunum í Klaksvík, og Henrik heldur, at alarmklokkurnar máttu nú havt ringt nóg leingið til, at handilsfólk byrja at fata álvaran í hesum.

- Seinastu tveir mánaðirnar hava 7 handlar í Klaksvík latið aftur. Tað bæði sæst og merkist, og onki bendir á, at gongdin fer at venda í bræði. Tað tykist sum, at handilsfólk bara sita og bíða eftir, at okkurt hendir av sær sjálvum. Tað eru í hvussu er ongi ítøkilig uppskot á borðinum um, hvat skal gerast, og tað tykist at vera sera trupult at fáa fólk at skilja álvaran í støðuni, sigur Henrik.

*- Vit bíða. Og tá onkir hendir, bíða vit eitt sindur afturat. Men nú eri eg bangin fyri, at handilslívið í Klaksvík longu hevur bíðað ov leingi, sigur Henrik Thøgersen, formaður fyri handilsfelagnum í Klaksvík*







*Handlarnir í Klaksvík lata aftur, ein fyri og annar eftir. Seinastu 2 mánaðirnar hava 7 handlar latið aftur*

## Gera ov lítið fyri kundarnar

Henrik heldur, at stóri trupulleikin er at handlarnir í Klaksvík stutt sagt gera ov lítið fyri kundarnar.

- Vøruúrvalið er lítið, og tænastustøðið er lágt - ofta beinleiðis vánaligt. Og hetta gongur ikki í longdini, tí kundarnir gerast alsamt meir krevjandi, sigur Henrik.

Hann minnir á, at tað er langt síðani nú, at flestu føroyingar fingu ráð at ferðast uttanlanda. Klaksvíkingar, eins og øll onnur, hava upplivað, hvussu handilslívið virkar aðrastaðni og teir vænta sjálvandi somu tænastu her heima. Og tá teir ikki fáa tað, fara teir sjálvandi aðrastaðni.

- Hugburðurin hjá handilsfólki hevur verið tann vanligi, at tað gongur nokk allíkavæl. Men prógvini um, at tað allíkavæl ikki gekk, eru nú so nógv, at tað mátti fingið handilsfólk at rakna við, sigur Henrik.

## Ongin motivatión

Sambært Henrik, er hetta eitt mál, sum av og á er uppi á fundum í handilsfelagnum, men stóri trupulleikin er, at lítil og ongin motivatión tykist vera millum limirnar til at gera nakað munagott.

- Eg má tíverri bara ásanna, at hugburðurin mótvegis teimum broytingum, sum ligga fyri framman í sambandi við norðoyatunnilin, als ikki bara er positivur, staðfestir Henrik.

Hann sigur víðari, at meðan tað sjálvsagt eru nøkur, sum síggja framtíðina sum eina spennandi avbjóðing, eru tað nógv, sum helst vilja hava, at alt bara verður verandi, sum tað altíð hevur verið.

Tað hjálpir heldur ikki uppá motivatiónina, at ongin fær nakað at vita frá býráðnum um, hvat verður av handilsmiðstøðini. Uttan mun til, um tú ætlar at reka handil í handilsmiðstøðini ella aðrastaðni, so fer ein slík miðstøð at hava stóra ávirkan at alt handilslívið í býnum. Tað eru hóast alt nøkur handilsfólk, ið fegin vilja, og tey eiga at fáa møguleikan at fyrireika seg til tær broytingar, sum býráðið hevur ætlanir um, sigur Henrik Thøgersen.

# Ikki so lokalir kortini

**Klaksvíkingar bera vanliga orð fyri at vera serliga lokalir. Men tá tað ræður um at keypa lokalt, tykist tað ofta at vera beint øvut. Og eg skilji væl hví, sigur Jógvan Jacobsen, handilsmaður í Klaksvík**

HANDILSLÍV
*Anna V. Ellingsgaard,*
*anna@sosialurin.fo*

At Klaksvíkingar fara aðrastaðni at keypa er ikki nakað nýtt, heldur Jógvan Jacobsen, sum dagliga rekur handilin J.H. Møblar í Klaksvík. Tað hava teir altíð gjørt, og at teir framvegis gera tað, er ofta bara av gomlum vana, og eisini tí tað kanska ofta er ein uppliving í sær sjálvum at fara ein túr til Havnar.

- Eg haldi ikki sjálvur, at vøruúrvalið í Klaksvík er so vánaligt, sum tú ofta hoyrir, men tað skal ikki vera nøkur umbering fyri, at vit handilsfólk, ikki kundu gjørt okkara arbeiði betri, sigur Jógvan.

Jógvan vísir á, at tað kemur sera sjáldan fyri, at tú sært lýsingar í sjónvarpinum frá handlum í Klaksvík. Og sum heild heldur hann, at handlarnir í Klaksvík kundu marknaðarført seg nógv betri.

## Mugu hava okkurt at bjóða

Jógvan vísir á, at ein handilsmiðstøð í sær sjálvum loysir ongan trupulleika, um handilsfólk ikki broyta hugburð mótvegis tí, at reka handil.

Tænastustøðið má hækka, og so mugu vit gera okkum greitt, at tá tunnilin kemur, eru vit í kapping við alt landið, sigur Jógvan, sum ikki ivast í, at ferðasambandið um Leirvíksfjørð í løtuni er størsta orsøkin til, at fleiri avbygdafólk ikki koma til Klaksvíkar til handils.

- Tá tunnilin letur upp, eri eg vísur í at tey fara at koma at forvitnast, men tað er okkara uppgáva at syrgja fyri, at tey tíma at koma aftur. Og tað gera vit bara, um vit royna at hava sama vøruútboð og somu somu ella betri tilboð, enn tey hava aðrastaðni.

- Eitt er í hvussu er vist, og tað er, at handilslívið í Klaksvík ikki longur kann dúva uppá lokalumráðið her norðuri. At ferðast um Leirvíksfjørð er ein partur av gerandisdegnum hjá nógvum Klaksvíkingum, og við tunnilinum verður tað bara uppaftur léttari - eisini at fara til handils. Og sum støðan í handilslívinum er í dag, vænti eg, at uppaftur fleiri Klaksvíkingar, enn áður, fara brúka hendan møguleikan til at gera síni ørindir aðrastaðni, sigur Jógvan Jacobsen.



*Myndatekstur:*
*Tá tunnilin letur upp, eri eg vísur í at avbygdafólk fara at koma at forvitnast eftir vøruúrvalinum her norðuri, men tað er okkara uppgáva at syrgja fyri, at tey tíma at koma aftur, sigur Jógvan Jacobsen, handilsmaður í Klaksvík*

## Handilsmiðstøð - partur av størri heild

HANDILSLÍV
*Anna V. Elligsgaard,*
*anna@sosialurin.fo*

Rani Nolsø, býráðslimur, er ein av teimum, ið vónar at handilsmiðstøðin í Klaksvík verður veruleiki, sum partur av miðbýarætlanini.



- Ein handilsmiðstøð er ikki bara ein týdningarmikil íløga í sær sjálvum, men fer eisini at stimbra hugin hjá bæði klaksvíkingum og øðrum at fremja íløgur í Klaksvík.

Men alt hetta skuldi helst byrja við norðoyatunnilinum. Um ikki tunnilin og teir møguleikar, hann hevur við sær, fer at frema íløguhugin í Klaksvík, so er okkurt grundleggjandi galið her norðuri, sigur Rani, sum ásannar, at sum støðan er í løtuni, er handilslívið ikki nokk til at lokka fólk til Klaksvíkar, hvørki tá tað snýr seg um at gera íløgur ella at fara til handils.